Búskapur og vinna:

## Statoil afturgongd

Úrslitið hjá Statoil fyrsta ársfjórðing í ár var tríggjar mia. norskar krónur, og tað var 1,3 mia. krónur minni enn í sama ársfjórðingi í 2001.

Statoil sigur, at umsetningurin fyrsta ársfjórðing var 54,8 mia. krónur ímóti 50,8 mia. krónur tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í fjør. Felagið sigur, at framleiðslan hevur verið 9 prosent størri í ár enn í fjør, men at prísirnir hava verið lægri. At kalla øll meirframleiðslan hevur verið á pallum í útlondum, tí á norska landgrunninum hevur Statoil bundið seg til at avmarka framleiðsluna.

## Fiskimenn missa arbeiðið

Hagtøl hjá donsku hagstovuni vísa, at danskir fiskimenn eru í størri vanda fyri at gerast arbeiðsleysir enn fólk, sum arbeiða á landi. Ein uppgerð fyri gongdina tað seinasta hálva árið vísir, at av teimum, sum mannaðu donsku fiskiskipini í november í fjør, vóru 4,7 prosent arbeiðsleys í apríl. Ein annar bólkur, sum eisini tykist serliga ótryggur á arbeiðsmarknaðinum, eru tað, sum arbeiða á gistingarhúsum og matstovum.

## Flyta bilar

Fyrrverandi stjórin í danska reiðarínum Easy Line, norðmaðurin Tom Bringsværd, hevur nú stovnað reiðaríið Scandinavian Car Carriers. Felagið rekur átta skip, ið sum navnið sigur flyta bilar. Pengarnir í nýggja reiðarínum eru yvirhøvur norskir, og nøkur av teimum átta skipunum sigla undir norskum flaggi.

Tey flestu skipini hjá Scandinavian Car Carriers sigla fyri suðurkoreansku bilverksmiðjuna Hyundai, meðan onnur flyta brúktar bilar til lond í Afrika og í Eysturevropa. Tom Bringsværd sigur, at hann eisini umhugsar at fara undir at flyta brúktar bilar úr Danmark til áhugaðar keyparar aðrastaðni.

UTTAN ÚR HEIMI

# Herverk kanska orsøk til tokvanlukku




*Sambært einari fyribilsfrágreiðing fór eitt tok út av jarnbreytini norðan fyri London seinasta fríggjadag, tí onkur hevði tikið skrúvurnar úr einum sporskifti*
*Mynd: Reuters*

**Bretsku myndugleikarnir siga, at herverk var kanska orsøkin til tokvanlukkuna uttan fyri London seinasta fríggjadag**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Myndugleikarnir, sum kanna tokvanlukkuna norðan fyri London seinasta fríggjadag, søgdu í einari fyribilsfrágreiðing í gjár, at vanlukkan møguliga stóðst av herverki.

Í frágreiðingini stóð, at skrúvurnar í einum sporskifti vóru tiknar úr, soleiðis at sporskiftið lá leyst, tá tokið við 150 kilometra ferð kom norður eftir jarnbreytini við Potters Bar 19 kilometrar norðan fyri London.

Myndugleikarnir funnu skrúvurnar stutt frá sjálvum sporskiftinum. Í frágreiðingini stóð, at trýstið á tað leysa sporskiftið gjørdist ov stórt, soleiðis at skiftið fór av lagi við tí úrsliti, at tann aftasti tokvognurin fór á skeiva breyt.

Vanlukkan kravdi sjey mannalív, og umleið 70 fólk fingu skaða. Sambært myndugleikunum hava fleiri teirra fingið varandi mein.

Fyribils eru myndugleikarnir komnir til ta niðurstøðu, at annaðhvørt var talan um herverk, ella hava eftirlitsmenn hjá jarnbreytarfelagnum gloymt at skrúva sporskiftið fast. Sagt verður, at menn hjá jarnbreytarfelagnum Railtrack arbeiddu upp á breytina við Potters Bar fyri hálvari aðru viku síðani. Menninir arbeiða ikki hjá Railtrack, men hjá einum felagi, sum var biðið um at kanna jarnbreytina.

Railtrack kom undir alment eftirlit fyri einum ári síðani eftir fleiri mistøk og brek, og Stephen Byers, samferðslumálaráðharri er undir stórum trýsti eftir vanlukkuna fríggjadagin. Samstundis vísa kanningar, at nógvir bretar kenna seg ótryggar, tá teir ferðast í toki, hóast bæði jarnbreytafeløg og politikarar hava roynt at sannføra fólk um, at tokferðslan er trygg.

Eygleiðarar í London siga, at tilburðurin við Potters Bar ger tað trupult at sannføra fólk um, at tey trygt kunnu ferðast á bretska jarnbreytarkervinum.

# Saudiarabia stuðlar bumbumonnum

**Ísraelsmenn siga seg hava prógv fyri, at felagsskapir í Saudiarabia stuðla avvarandi hjá palestinskum sjálvmorðsbumbumonnum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Í einari 85 síður drúgvari frágreiðing, sum fregnartænastan hjá ísraelska herinum hevur skrivað, stendur, at avvarandi hjá palestinskum sjálvmorðsbumbumonnum fáa fíggjarligan stuðul frá einum felagsskapi, sum saudiarabiski innanríkisráðharrin stendur á odda fyri.

Ísraelski ráðharrin Limor Levnat, sum hevur verið við í kanningararbeiðinum, sigur, at Saudiarabia noyðist at gera av, um landið skal teljast millum teirra, sum virka fyri friði og ímóti yvirgangi. Ráðharrin segði, at ísraelska stjórnin roknar lond sum Jordan, Egyptaland og Marokko millum teirra, sum virka fyri friði, meðan Irak, Iran og Sýrialand teljast millum tey stríðshugaðu. Spurningurin er so, hvørjum bólki Saudiarabia er í, segði ísraelski ráðharrin.

Fregnartænasta hjá ísraelska herinum sigur, at avvarandi hjá palestinskum sjálvmorðsbumbumonnum hava fingið 33.000 amerikanskar dollarar. Sagt verður, at meginparturin ella 25.000 dollarar koma úr Irak, 5.300 dollarar eru úr Saudiarabia, Sameindu Arabisku Emiratini og Qatar rinda 500 dollarar í part, og at enda fáa tey avvarandi 2.000 dollarar frá teimum palestinsku sjálvstýrismyndugleikunum, sigur ísraelska fregnartænastan.

Prógvini siga ísraelsmenn seg hava funnið undir hernaðarátakinum á Vestara Áarbakka í síðsta mánað.

Úr Norðurlondum:

## Spara nógv

Beint ímóti vallyftunum hjá stjórnarflokkunum hava kommunurnar í Danmark boðað frá, at tær fara at spara munandi í útreiðslunum til barnaansing, barnaskúlan og tey eldru.

Formaðurin í danska kommunufelagnum KL, vinstramaðurin Ejgil W. Rasmussen, sigur, at kommunurnar noyðast at spara umleið 450 mió. krónur í ár, og hann væntar, at tær noyðast at spara uppaftur meiri næsta ár, heldur stjórnin fast um tann politikkin, sum hon hevur boðað frá.

Formaðurin í KL sigur, at kommunurnar hava ikki møgleika at spara, uttan at tað rakar tænastustøðið, og at tað serliga verða børnini og tey eldru, sum koma at kenna sviðan av sparingunum. Fleiri kommunur hava eisini sagt, at tær verða noyddar at siga fólk úr starvi sum lið í sparingunum.

## Til Noregs

Politiski andstøðuleiðarin í Myanmar, Aung San Suu Kyi, hevur boðað frá, at hon ætlar sær til Noregs at vitja. Suu Kyi varð herfyri latin leys, eftir at hon hevði sitið í húsavarðhaldi. Í samrøðu við eina japanska sjónvarpsstøð í síðstu viku segði hon, at hon ætlar sær at fara til Noregs at takka fyri tann stuðul, sum hon hevur fingið haðani. Aung San Suu Kyi fekk fyri nøkrum árum síðani Nobelfriðarheiðurslønina.

## Smáir flokkar betri

Ein kanning í Svøríki vísir, at børnini í teimum smáu skúlaflokkunum fáa meiri burtur úr frálæruni enn børn, sum ganga í stórum flokkum. Kanningin vísir eisini, at veikir næmingar fáa meiri burturúr, verða teir fluttir í teir smærru flokkarnar. Kanningin er gjørd á 16 skúlum í og uttan um Stockholm og hevur givið svensku politikarunum nakað at hugsa um, skrivar Dagens Nyheter.



# Ber til at semjast uttan buldur og brak

**– Nýggi sáttmálin við reiðararnar er eitt dømi um at tað ber til at semjast um loysnir uttan buldur og brak, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

–Vit eru væl nøgdur við sáttmálan tí vit hava fingið rættiliga avgerðandi mál við í sáttmálan.

Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagum heldur, at nýggi sáttmálin, sum nú er gjørdur við Reiðarafelagið um korini hjá fiskimonnum, er eitt rættiliga stórt framstig.

Sáttmálin gekk út 1. des. og síðani hava partarnir samráðst meiri og minni.

– Eg haldi, at sáttmálin, vit hava gjørt við Reiðarafelagið, vísir, at tað ber væl til at røkka semjum og at finna loysnir uttan buldur og brak, sigur Óli Jacobsen Hann hugsar fyrst og fremst um, at tað nú hevur eydnast at fáa eina áseting um eftirløn til fiskimenn við í sáttmálan.

– Tað er eitt gjøgnumbrot fyri fiskimenn. Prinsippið um eftirløn til fiskimenn er nú gjøgnumført og hóast tað ikki fer at virka frá degi til annan, er skjøtil settur á, sigur Óli Jacobsen.

Fiskimaðurin fær eftirløn fyri hvønn dag, hann er á sjónum og skipanin kemur í gildið 1. juli í ár.

Frá tí degi skal hvør fiskimaður betala 10 krónur um dagin inn á eina eftirlønarkonto og reiðarin skal betala 15 krónur.

Frá 1. juli næsta ár og til sáttmálin gongur út 31. des., skal hvør fiskimaður betala 20 krónur um dagin inn á eina eftirlønar konto og reiðarin betalir 27 krónur

Verður onki annað avtalað, skulu fiskimenn og reiðarar í framtíðini annars rinda hvør sína helvt av eftirlønini.

Óli Jacobsen sigur, at nú er eftir at finna semju við reiðararnar um, hvussu høgt gjaldið skal vera, men í fyrstu syftu verður tað helst 27 krónur um dagin til hvønn partin.

– Ætlanin er í hvussu so er at gera eina skipan, sum tryggjar einum fiskimanni eina veruliga eftirløn eftir eitt lívsverk á sjónum.

Hann sigur eisini, at felagið fer at arbeiða fyri at broyta lógina, so at fiskimenn ikki verða revsaðir í skatti, fara teir frá við eftirløn áðrenn teir fylla 67 ár. Eftir skipanini, sum nú er, betala fólk munandi meiri í skatti av eftirlønaruppsparing, tá ið tey taka hana út, áðrenn tey fylla 67 ár, enn tey gera, um tey bíða til eru fylt 67 ár. Og tað heldur Óli Jacobsen er órímiligt fyri fiskimenn, sum mangan verða pensjoneraðir áðrenn teir fylla 67.

Umframt hetta, eru aðrar, smærri broytingar gjørdar.



*Nýggi sáttmálin við reiðararnar er eitt gjøgnumbrot fyri fiskimenn, sigur Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum*

### Kostar 70.000 eyka

Eisini Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum er hampiliga væl nøgdur við sáttmálan.

Hann sigur, at Afturfyri hesa eykaútreiðsluna, verður býtisprosentið hjá manningini við teimum størri rækjuskipunum lækkað.

# Kostar 65.000 krónur um árið

**Reiðarafelagið er sinnað at toyggja seg langt fyri at sleppa undan verkfalli, sigur Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum**

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGA
*Áki Bertholdsen*

Eisini Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum er hampiliga væl nøgdur við sáttmálan, sum nú er gjørdur við Fiskimannafelagið.

Hann sigur, at sjálvandi er talan um eykaútreiðslur, men at Reiðarafelagið er til reiðar at toyggja seg langt fyri at sleppa undan verkfalli. Tað hevur vigað rættiliga nógv, sigur hann.

Og okkara grundsjónarmið er eisini, at manningarnar skulu trívast væl umborð, men sjálvsagt er tað ein millumvegur.

Útreiðslur koma ongantíð væl við, serliga hjá skipum, sum hava tað tungt frammaundan, ikki minst rækjuskipunum.

Hann sigur, at afturfyri tær eykaútreiðslur ið standast av sáttmálanum, er tískil ein serlig skipan gjørd fyri tey stóru rækjuskipini, so at tey ikki fáa eykaútreiðslur av sáttmálanum. Tað er gjørt við at lækka býtisprosentið eitt lítið sindur. Jákup Sólstein sigur, at hjá einum vanligum línubáti fer sáttmálin at kosta einar 65.000 krónur um árið tilsamans.

Hjá einum partrolara kostar hann helvtina, men hjá einum trolara við nógvum fólki, kostar tað meir.

– So tilsamans er ikki talan um tær stóru broytingarnar, sigur Jákup Sólstein.

Hinvegin vísir hann eisini á, at fiskimenn hava havt rættiga góða inntøku seinastu árini.



*– Vit halda, at manningarnar skulu hava tað gott umborð, men tað skal sjálvsagt finnast ein millumvegur, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum, Jákup Sólstein*

# Nú mugu fiskimenn út á dekkið at festa sær í

**Nú er bannað at roykja í øllum felagsrúmum umborð á føroyskum fiskiskipum**

ROYKIPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

Tað gerst alsamt meiri og meiri vanligt, at arbeiðspláss fáa roykipolitikk, har greiðar reglar verða gjørdar fyri, hvar tað er loyvt at roykja og helst, hvar tað ikki er loyvt at roykja.

Og nú er roykipolitikkur eisini settur í verk umborð á føroyskum fiskiskipum. Og úrslitið av tí roykipolitikkinum er, sum alla aðrastaðni, at nú verða tað teir fiskimenn, ið roykja, sum mugu laga seg eftir teimum, sum ikki roykja.

Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið fylgja við tíðini, so tá ið tey bæði feløgini í farnu viku gjørdu nýggjan sáttmála, er roykipolitikkurin við.

Í sáttmálanum stendur stutt og greitt, at royking skal vera bannað í felagshølum umborð.

Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, ásannar, at helst verður misjavnt, hvussu fiskimenn fara at taka ímóti hesum.

– Men vit vita, at royking er heilsuskaðilig. Tað hevur altíð verið so, at teir, sum ikki roykja, hava ligið undir fyri teimum, sum roykja. Men hereftir verða tað so teir fiskimenn, sum roykja, sum mugu laga seg eftir teimum, sum ikki roykja.

Hann sigur, at spurningurin um royking avgjørt ein ein týðandi partur av trivnaðinum umborð.

– Nú er ikki longur nóg mikið at tosa um løn og um pening. Arbeiðsfólk seta eisini krøv til trivnaðin á arbeiðsplásunum og tað gera fiskimenn somuleiðis. Og at seta bann fyri royking í felagshølum umborð er ein partur av hesum.

Óli Jacobsen sigur, at roykiforboð skal fyrst og fremst vera har tað verður etið og sovið, tvs, at tað fyrst og fremst skal vera bannað at roykja í messuni og í kømurunum.

Men annars er roykiforboð í øllum felagsrúmum. Sostatt verður næstan neyðugt at fara út á dekkið at festa sær í.

Ein annar partur av trivnaðinum umborð, er larmurin umborð og Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið skulu samstarva fyri at fyribyrgja skaðar av larmi.

Í sáttmálanum, sum er galdandi til 1. desember næsta ár, stendur eisini, at fiskimenn eisini skulu hava møguleikar fyri at hoyra útvarpið í serligum oyratelefonum, sum eisini eru hoyrivernd. Men hesar hoyriverndir skal hvør einstakur fiskimaður sjálvur útvega, gjalda og hava ábyrgdina av.

### Styttri túrar

Í nýggja sáttmálanum verður túralongdin eisini stytt. Higartil hava fiskimenn ikki krav uppá at sleppa heim, fyrrenn túrurin hevur vart í fýra mánaðir.

Tað er nú lækkað til 3 1/2 mánað og frá 1, januar verður túralongdin aftur lækkað niður í tríggjar mánaðir.

Somuleiðis skulu trygdarumboð veljast umborð á hvørjum skipi.



*Eftir nýggja sáttmálanum ímillum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið mugu teir fiskimenn, sum roykja, nú boyggja seg fyri teimum, sum ikki roykja*